## Fíggjarkreppan sker í West Ham

Stjórin í enska West Ham, Scott Duxbury, viðgongur, at tað er væl møguligt, at fleiri av bestu spælarunum hjá felagnum verða seldir, nú transfer-vindeygað aftur er opið. West Ham hevur í ólukkumát kent sviðan av fíggjarkreppuni, og seinastu tíðina hevur ljóðað, at Craig Bellamy, Matthew Upson og Scott Parker allir eru á veg úr felagnum. – Vit eru ikki í eini støðu, har vit kunnu siga, at ein spælari als ikki er til sølu, sigur Duxbury við ensku miðlarnar.



## Kreppufundur í Chelsea

Sambært enska Daily Mail hevði Chelsea kreppufund týskvøldið undan ársskiftinum. Orsøkin til hetta eru úrslitini hjá felagnum, sum ikki hava verið heilt so góð seinastu tíðina. Við nýggja venjaranum, Luiz Felipe Scolari, byrjaði Chelsea annars sera væl, men seinastu umførini er liðið snávað fleiri ferðir, og Chelsea tykist í løtuni í vanda fyri at missa sambandið við Liverpool, sum er á oddasessinum. Tí er trýstið á Scolari eisini sera stórt, men stjórin í felagnum, Peter Kenyon, sigst tó hava fult álit á venjaranum.

# Oddabrak skjýtur árið inn



*Talan verður um veruligt oddabrak, tá føroysku hondbóltsharrarnir skjóta nýggja árið inn sunnudagin*

**Sunnudagin verður oddabrak í bestu mansdeildini í hondbólti, tá Neistin tekur móti VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar hevur Neistin veruliga funnið FM-stevið aftur, og saman við VÍF eru teir á odda í bestu mansdeildini í hondbólti.

Tí mugu teir bláu uttan iva roknast sum favorittar, tá teir taka móti VÍF, sum fram til seinasta umfarið var einsamalt oddalið, men sum fekk ein ordans framm-aná, tá teir á heimavølli tóku ímóti H71.

Júst tann sigurin gav eisini H71 møguleika at ota seg nærri oddinum, og teir eru uttan iva til reiðar at taka av, tá Kyndil kemur á vitjan í Hoyvík sunnudagin.

Seinasti dysturin hetta umfarið er á Skála, har StÍF tekur ímóti KÍF. StÍF hevur seinastu umførini av álvara mist sambandið upp til oddin, og so er spurningurin, um teir kunnu rætta skútuna nakað, nú KÍF, sum er aftast í deildini, vitjar.

### Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

*Atlantic Airways-kappingin*

04.01 16.00 Neistin-VÍF
04.01 16.00 H71-Kyndil
04.01 16.00 StÍF-KÍF

**Hondbóltur**

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 276 | 253 | 23 | 14 |
| 2 VÍF | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 241 | 225 | 16 | 14 |
| 3 H71 | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 243 | 212 | 31 | 12 |
| 4 StÍF | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 215 | 222 | -7 | 8 |
| 5 Kyndil | 9 | 1 | - | 2 | - | 6 | 221 | 251 | -30 | 4 |
| 6 KÍF | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 216 | 249 | -33 | 2 |

SPURNARKAPPING:
TALENT
15 TALENT-SPØL AT VINNA



600 spurningar og gátur
- vísdómur og avbjóðingar

Føroyingar grava ikki niður sínar TALENTIR, men kappast, hugna og stuttleika sær saman á jólum og alt árið.
**TALENT** er ætlað øllum, sum ikki eru bangin fyri at spyrja okkurt býtt og læra okkurt nýtt.

VISTI TÚ
"... at teir gomlu egyptarnir svóvu á steinpútum"

**Vinnararnir av talent:**
kunnu avheinta spølini í

Miðlahúsinum
Tórsgøta 1
Tórshavn.




*Ein spennandi Svartur Kassi við gátum, uppgávum og spurningum til børn og ung og ØLL, sum vilja at tað skal vera lætt at svara rætt!*

Vinnararnir:

24. november: Jóhan Rygshamar, tel. 272170
Matias Madsen, tel. 605683

1. desember: Eyðbjørg Johannesen, tel. 582363
Olga Gullaksen, tel. 421532

8. desember: Katrin á Fløtunum, tel. 252384
Jógvan Linklett, tel. 223865

15. desember: Annelisa Joensen, tel. 443211
Pól Dánjal, tel. 228206

31. desember: Ása Ósá, tlf. 540816
Símun Hans Jacobsen, tlf. 444292